gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Ein innspræning kundi sparka vágbingar ígongd

**– Ítøkiligar ætlanir eru um at at byggja virki, sum skapa eini 120-150 arbeiðspláss í Vági. Men einsamøll hevur kommunan ikki ráð til at skapa karmarnar**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*

– Skulu vit tosa um økismenning, kundi landið ikki gjørt nakra betri tiltak, enn at givið vágbingum ein stuðul til at byggja havnalagið út fyri.

Tað sigur Jógvan Krosslá, býráðsformaður í Vági.

Onki øki í landinum var ð so hart rakt av kreppuni, sum syðra helvt í Suðuroy.

Seinastu árini hevur tað tó gingið framá aftur í smáum. Men tær ætlanir, sum nú eru frammi í Vági, hevði veruliga lyft syðru helvt í Suðuroynni upp aftur á sama støði sum nógv onnur øki í landinum.

Ítøkiligar ætlanir eru frammi um at gera íløgur í vinnuvirki í Vági fyri einar 150 milliónir krónur. Tilsamans fara hesi virkini at skapa eini 120-150 arbeiðspláss.

Talan er um at byggja frystigoymsluma, sum er, út. Harumframt eru ætlanir um at byggja eitt virki til uppsjóvarfisk, umframt at laksavirki skal gerast í gamla flakavirkinum, Polarfrost.

Sum umstøðurnar nú eru í Vági, ber ikki til at byggja hesi virkini. Ikki minst eru havnaviðurskiftini ikki nøktandi.

Men tann stóri trupulleikin er, at Vágs Kommuna hevur ikki ráð til at byggja havnina út. Sostatt hevur hon ikki ráð til at skapa karmarnar fyri, at hesar vinnuligu íløgurnar kunnu gerast.

## Neyðugt at gera djúphavn

Skulu hesar íløgurnar gerast veruleiki í Vági, er tað fyrst og fremst neyðugt at dýpa havnina, tí nógv av teimum skipum, sum skulu at bryggju í samandi við virkini, stinga so djúpt, at tey sleppa ikki at sum er.

Í løtuni er havnin í Vági, har sum fiskavirkini eru, sjey metrar.

Jógvan Krosslá, býráðsformaður í Vági, sigur, at tað er neyðugt við eini havn, sum er 10 metrar djúp.

Hetta er eitt arbeiðið, sum kostar 16-18 milliónir.

– Tað hevur Vágs Kommuna ikki ráð til at gera einsamøll.

Vágs Kommuna hevur tí søkt landsstýrið um stuðul til at fáa arbeiðið gjørt, samstundis sum kommunan ætlar at betala ein part.

Málið er nú til viðgerðar í Landsstýrinum.

Annars hevur kommunan gjørt avtalu við Landsverkfrøðingin um at fáa grótið, sum er tikið úr Sumbiarbergholinum og sum nú liggur í Lopransdali. Tað grótið verður nu flutt til Vágs at gera havnalagið størri.

## Sparka ígongd

Borgarstjórin í Vági sigur, at hann er ikki fyri studningi, sum so.

Men viðhvørt er tað neyðugt at fáa eina fíggjarliga innspræning fyri at fáa virksemið sparkað ígongf.

Hann sigur, at Sandoyggin og Fuglafjørður eru tvey talandi dømi um, hvørja ávirkan ein slík innspræning hevur.

– Tað almenna setti tríggjar milliónir í eina sandoyarætlan, nú gongur sjón fyri søgn, hvussu nógv virksemið tað hevur kastað av sær.

Fuglafjørður fekk seks milliónir til at byggja havnina út fyri og tað hevur beinleiðis kollvelt plássið.

Jógvan Krosslá sigur, at hvørki Sandoyggin, ella Fuglafjørður vóru so niðurundirkomin í kreppuni, sum syðra helvt í Suðuroynni var.

Hann sigur, at Fuglafjørður var í næstan somu støðu sum Vágs Kommuna.

– Fyri trimum árum síðani vóru tvey fólk á muni á býunum báðum. Nú búgva 150 fólk fleiri í Fuglafirði og vendin kom, tá ið landið læt seks milliónir í stuðuli til havnabygging.

– Tað hevði eisini havt ómetaligan týdning fyri syðru helvt í suðuroy, og kundi tað almenna hjálpt til við eini lítlari innsrpæning, mátti tað eisini verið til landsins besta, at hetta varð gjørt.

– Hendi onki nú, verður tað ómetaliga strævið hjá hesum økinum at koma uppundan aftur, sigur Jógvan Krosslá.



*–Vinnulívsmenn hava stórar ætlanir í Vági. Men teir fáa ikki sett tær í verk, tí kommunan hevur ikki ráð til at skapa karmarnar. Tí er tað lívsneyðugt við eini fíggjarligari innspræning úr landskassanum, sigur Jógvan Krosslá, býráðsformaður í Vági*

Siti/standiborð
is t
o ta borðið ið



Siti/standiborðini gerast alt vanligari á skrivstovunum kring Europu - og nú eisini í Føroyum

Meiri enn helmingurin av seldu skriviborðunum í Danmark seinasta árið vóru av hesum slagi. Nú kanst tú sjálv/ur lættliga velja arbeiðsstøðuna, sum passar tær - og rygginum - best!

FARODANE 02-01

El-stýrd siti/standiborð úr kr. 9.900,-

FARODANE

Brekkutún 4
o t ok 1
F -11 T r a n
Tlf. 311414
Fax 317534
e- o tur
farodane farodane.fo
www.farodane.fo

*Farodane er 50 ára gamalt handils- og tænastuvirkið, sum í dag er ein av fremstu heildarveitarum til skrivstovuna. Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, kopi-, fax- og AV-tólum, skrivstovuinnbúgvi og øðrum skrivstovubúnaði.*




gult5 cyan5 magenta5 svart5